Signar Simonsen, verkfrøðingur, heitir á landsstýrið:

# – Heldur undirsjóvartunnil enn tvær nýggjar ferjur

**Landið hevur gjørt íløgur í nýggja suðuroyarferju og nýggja sandoyarferju. Signar Simonsen, verkfrøðingur, heldur, at hetta er at tveita peningin burtur, tí skilabetri hevði verið at gjørt eina íløgu í undirsjóvartunnil millum Streymoynna og Sandoynna. Smyril skuldi síðani siglt um Suðuroyarfjørð til Sandoynna. – Málið má vera fast samband til Suðuroynna um Sandoynna, sigur Signar**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Stefan í Skorini*

Landsstýrið hevur gjørt íløgu í tvey nýggj skip, sum skulu vera partur av Strandfaraskipum Landsins. Nýggja sandoyarferjan fer at kosta 60 milliónir krónur, meðan suðuroyarferjan fer at kosta 300 milliónir krónur. Hetta er ein samlað íløga uppá 360 milliónir krónur. Røddir eru tó frammi um, at peningurin skuldi verið øðrvísi gagnnýttur.

– Peningurin skuldi ístaðin verðið settur í ein undirsjóvartunnil millum Streymoynna og Sandoynna. Eg meti, at ein undirsjóvartunnil hesar báðar oyggjarnar millum hevði kostað umleið 450 milliónir krónur, sigur Signar Simonsen, ið arbeiðir sum ráðgevandi verkfrøðingur.



*Signar Simonsen, verkfrøðingur, heitir á landsstýrið um at kanna møguleikan fyri einum undirsjóvartunli til Sandoynna. Tíðin er komin, at vit fara at hugsa øðrvísi, sigur Signar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Fleiri túrar

Um ein undirsjóvartunnil varð gjørdur, hevði Smyril siglt millum Sand og Drelnes.

Hetta hevði økt munandi um túratalið, soleiðis at suðuroyingar høvdu havt betri samband við meginøkið. Munurin er bara, at siglt hevði verið til Sands og ikki til Havnar.

Tað hevur altíð verið týdningarmikið hjá suðuroyingum at fáa fleiri túrar til meginøkið, men við hesi loysnini verða nógv fleiri túrar úr Suðuroynni tí siglingarleiðin styttist nógv, og tað er eitt, sum Signar leggur dent á.

– Um Smyril ístaðin sigldi millum Sandoynna og Suðuroynna, økist túratalið úr Suðuroynni, og tað hevði eisini hjálpt vinnulívinum í oynni, sum ikki hevði havt so langa bíðitíð sum nú, sigur Signar, sum metir, at vinnan mangan má bíða nakað leingi eftir luttum, sum eru bílagdir.

### Katalysator

Signar metir, at Føroya land hevði fingið nógv meira burturúr pengunum, um teir vórðu nýttir til ein undirsjóvartunnil.

– Um peningurin varð nýttur til ein undirsjóvartunnil, hevði hann í størri mun farið í ringrás í føroyska samfelagnum og fleiri arbeiðspláss høvdu verið skapt. Ein ferja verður hinvegin avskrivað og missir sítt virði, sum tíðin líður.

– Hetta hevði verið sum ein katalysator fyri virksemi á Sandoynni, sum hevði verið meira í miðdeplinum, sigur Signar.

Hann metir, at vinnulívið á Sandoynni hevði havt nógv betri møguleikar at fáa fatur á útbúnari arbeiðsmegi. Hetta er ein stórur vansi hjá fyritøkum í øllum útjaðarum, sum

Tað er tó ikki væntandi, at landsins myndugleikar fara at fremja eina slíka verkætlan í bræði, men Signar heldur, at tað er tíð til, at landsins kosnu menn kanna henda møguleikan, tá so nógvir fyrimunir eru við honum. – Landsins myndugleikar hava skyldu til at kanna tølini fyri hesi ætlanini, sigur Signar at enda.

### Fellur í góða jørð

Bæði á Sandoynni og í Suðuroynni munnu vera mong, sum taka undir við sjónarmiðunum hjá Signari.

Í Sosialinum í gjár var frásøgn frá fundi í sambandi við útjaðarapolitikk landsins. Har varð ljós varpað trupulleikarnar hjá útjaðaranum. Eyðun Viderø, tinglimur og fyrrverandi bygdaráðsformaður á Sandi, segði í hesum sambandi, at størsta framstig hjá oynni hevði verið ein undirsjóvartunnil.

Linjohn Christiansen, bygdaráðsformaður í Skálavík, vísti eisini á, at hóast eini 400 milliónir krónur eru nýttar til samferðslukervið í Sandoynni, so eru bara eini 25 fólk, sum dagliga nýta farleiðina til Havnar.

Hetta bendir á, at peningurin til nýggju ferjurnar kundi verið farin til okkurt betri. Ein undirsjóvartunnil.

Tað er tó nakað seint at fara at tosa um ein undirsjóvartunnil til Sandoynna, nú íløgur eru gjørdar nýggja ferjulegu á Gomlurætt, nýggja sandoyarferju, havnina í Skopun og til ein nýggjan veg millum Havnina og Gomlurætt. Hetta er nógvur peningur og tí er lítið hugsandi, at landsstýrið fer at taka grundarlagið undan hesum íløgum við at gera aðra farleið til sama øki.

Signar Simonsen ivast tó ikki. – Farið undir arbeiðið beinanvegin.

---

Ítróttur:

# Oddabrak í Klaksvík

**Kvinnuliðini hjá Stjørnuni og VÍF seta hol á gundspælið við einum dysti, sum kann hava avgerandi týdning fyri FM-heitið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir eitt sindur av órógvan, orsakað av landsdystum og øðrum, fer endaspæli hjá hondbóltskvinnunum í gongd hóskvøldið. Fyrri dysturin verður eitt satt brak, tí her fara tey bæði ovastu liðini at bresta saman, og fyri heimaliðið, Stjørnuna, kann tað hava altavgerandi týdning, at tvey stig fáast burtur úr dystinum.

Hetta verður tó á ongan hátt lætt móti einum VÍF liði, sum bert hevur mist tað eina stigið i grundspælinum, tá tær spældu javnleik móti Stjørnuni. Ein stigamissur, sum vísti seg at vera týdningarleysur, tí nú endaspælið byrjar, hevur VÍF fult stigatal. Stjørnan er á øðrum plássi, tvey stig aftan fyri vestmannagenturnar, so ein heimasigur inniber, at alt aftur verður fullkomuliga javnt í hondbóltstoppinum.

---

# Bónus letur upp á Ægishædd

HANDIL
*Rúnar Reistrup*

Millum annað versnaðu parkeringsmøguleikar uttan fyri matvøruhandilin Bónus í Havn hava havt við sær, at SMS, ið eigur handilin, hevur gjørt avtalu við Postverk Føroya um at leiga seg inn í bygningin hjá Postverkinum á Ægishædd.

Gott parkeringspláss var uttan fyri handilin fyrr, men eftir at farið varð undir at byggja nýggja IDÉ húsið hevur onkuntíð verið í so trongligt hjá viðskiftafólkunum at parkera.

Nýggi Bónus handilin skal eftir ætlan lata upp einaferð í vár. Í nýggju hølunum fær handilin 700 fermetrar at búleikast í.

Sambært Niels Mortensen, stjóra í SMS, hevur fyritøkan ikki avgjørt, um Bónus skal flyta úr hølunum, har handilin nú heldur til, ella um handilin skal halda til bæði á Hálsi og á Ægishædd.




*Her, í bygninginum hjá Postverki Føroya á Ægishædd, letur matvøruhandilin Bónus upp handil í næstum*

*Mynd: Jens K. Vang*






## Frá Róðrarsambandi Føroya

Við hesum verður boðið til eykaaðalfund í ÍSF-húsinum 17. februar 2001 klokkan 10.00.

Skráin verður henda:

1. Val av orðstýrara
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
3. Áseting av bátamálum
4. Ymiskt

**Róðrarsambandið**

## SKEMT 2000

**fæst í sølubúðunum kring alt landið**
**Kostnaður 120,-**





**Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-**

**Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20**

Toll- og Skattstova Føroya

## STARV
## á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika, og skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, og teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða** eitt spennandi starv við møguleikum fyri eftirútbúgving,

- klokkuskipan við flextíð, og
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið** fáast við at seta seg í samband við Ingolf Lamhauge, økisstjóra, tlf. 448588.

**Umsóknir:** Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, Postboks 225, 600 Saltangará **innan 05. februar 2001.**

---

**Um stovnin:** Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, íð eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 18 fólk.

**SUBARU 4.WD við skaða**

**Ein sera vælhildin Subaru 1.8 GL Sedan, 4. hjólstrekk, reyður, 260.000 km., árg. jan. '89 við skaða til sølu.**

D. B. Bilar

Tel. 310 600